FAROE
LAW

# STOVNINGARSAMTYKT

Undirritaðu

Føroya Fróðskaparfelag, Handan Á 5, 100 Tórshavn, og

Fróðskaparsetur Føroya, J. C. Svabosgøta 14, 100 Tórshavn

eru í dag komin ásamt um at stovna eitt smápartafelag við navninum:

**Fróðskapur sp/f**
og hjánavninum
**Faroe University Press**

Endamál felagsins er at reka vísindaligt útgávuvirksemi og annað virksemi, sum natúrliga hoyrir til slíkt virksemi.

Innskotspeningur felagsins, sum allur er teknaður av stovnarunum, er kr. 440.000-, og er teknaður til kurs 100.

Smápartaprógv verða at skriva í smápartaprógvabók felagsins.

Eingi smápartaprógv hava framíhjárættindi.

Smápartaeigararnir hava ikki skyldu at lata smápartaprógv síni innloysa.

Smápartaprógvini kunnu frítt verða seld millum upprunaligu smápartaeigararnar, men annars einans við loyvi frá nevndini.

Hvør smápartaeigari hevur eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 1.000,-, hann eigur í innskotspeningi.

Eingin av stovnarunum ella nakar annar fær garantiprovisión ella nakað annað viðurlag í sambandi við stovnanina.

Felagið rinda stovningarútreiðslurnar, sum ikki fara upp um kr. 25.000,00.

Tórshavn, 15/9 2005.

VEGNA FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG:

VEGNA FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA: